# Thue Christiansen í Tilhaldinum



*Í september hevði grønlenski listamaðurin og politikarin Thue Christiansen undirvísing í horn og træhondverki í Tilhaldinum. Her leggur hann Hendriki Rubeksen lag á*

**Í døgunum 11.-15. september 2006 skipaði Tilhaldið í Tórsgøtu fyri fyri skeiði í horn og træhondverki. Tað var kendi grønlenski listamaðurin og politikarin Thue Christiansen, sum undirvísti á skeiðnum**

SKEIÐ

*Myndir: Tilhaldið*

Kendi grønlenski listamaðurin og politikarin Thue Christiansen undirvísti í døgunum 11.-15. september á skeiði í horn og træhondverki í Tilhaldinum í Havn.

Thue Christiansen er 66 ár gamal. Hann er útbúgvin lærari og hevur arbeitt sum lærari bæði í Danmark og mong ár í Grønlandi.

Hann er eisini kendur politikari, og var hann t.d. landsstýrismaður í fyrsta grønlandska landsstýrinum, eftir at Grønland fekk heimastýri í 1979.

Sum listamaður hevur hann teknað grønlenska flaggið og gjørt búmerkir til fleiri fyritøkur og stovnar.

Hann er giftur við Katrin Jensen, sum er donsk men av føroyskari ætt.

Fyrsta dagin varð farið niðan í Brekkutún á Fornminnisavnið, at fáa íblástur og hugskot til eitthvørt at evna til. Á myndunum sæst at rættiliga væl kom burtutúr, hesar fimm dagarnar.

Skeiðið endaði við at skeiðlutakarnir tóku samanum. Ein av niðurstøðunum var, at eitt tílíkt skeið var vert at endurtaka. Møguliga við øðrum tilfari. Ein framsýning var eisini, har fólk høvdu høvi at síggja hvat skeiðluttakarnir høvdu evnað til úr horni og træi. Myndirnar tala fyri seg. Her skortar ikki hugflog.



*Skeiðluttakarar práta saman*



*Pauli Vang ger prýðislutir*



*Jákup Lindenskov, formaður í stýrinum fyri Tilhaldið, og Wanja Petersen, dagligur leiðari á Tilhaldinum*



*Thue Christiansen er 66 ár gamal og útbúgvin lærari*

